# Veðhavaralýsing: Alifiskur

Viðvíkjandi tryggingarskjali nr.:

Dagfest:

Tryggingarlutur:

Hægsta virði: kr.

Tryggingarstaður:

Miðal virði: kr.

Eigari (tann tryggjaði):

Veðhavari:

Henda trygging fevnir eisini um veðhavarainteressu. Veðhavaranum verða veitt somu rættindir móti tryggingarfelagnum og gongur undir somu skyldur sum tryggingartakarin, sum fyrisettar eru í niðanfyri nevndu reglum. Uttan so, at tað fylgir av niðanfyri nevndu reglum, hevur veðhavarin í ongum føri betri rættindir enn eigarin sjálvur.

**1.** Tryggingarfelagið kann ikki, so leingi veðhavarin hevur ikki fingið sítt, uttan hansara játtan útgjalda endurgjald fyri totaltap ella sum fyri totaltap til eigaran. Somuleiðis er viðvíkjandi endurgjaldi fyri tap, skaða ella deyða, sum fyri einstakan skaða fer upp um 10% av tryggingar-hæddini. Endurgjald, sum eftir hesum reglum ikki kann verða goldið eigaranum, uttan at veðhavarin játtar, kann tryggingarfelagið gjalda veðhavaranum og verða loyst frá allari ábyrgd.

**2.** Tryggingarfelagið bindur seg til ikki, uttan at veðhavarin játtar:

a. at gera avtalu við eigaran um, at tryggingin fer úr gildi, áðrenn tað tilskilaða tryggingarskeiðið er úti, ella um nakra munandi broyting í tryggingini, sum kann svíkja veðhavaran
b. gera avtalu við eigaran um at broyta ásetingarnar í tryggingarskjalinum, um at tryggingargjaldið skal verða goldið frammanundan, ella
c. at loyva eigaranum at drála við at gjalda tryggingargjaldið og til
d. at krevja tryggingargjaldið í rættari tíð.

**3.** Tryggingarfelagið bindur seg til skjótast til ber at boða veðhavaranum frá, um:

a. tryggingin, áðrenn tað avtalaða tryggingarskeiðið er úti, orsakað av, at alifiskurin skiftir eigara ella av aðrari orsøk, fer úr gildi ella verður uppsøgd, ella at tryggingarfelagsins ábyrgd fer úr gildi,
b. tryggingin ikki í seinasta lagi 14 dagar innan tað avtalaða tryggingarskeiðið er úti, er endurnýggjað, ella hon er endurnýggjað við munandi broyting, ella
c. tryggingargjaldið ikki verður goldið í rættari tíð.

**4.** Veðhavarin borgar sum sjálvskuldábyrgdari fyri tryggingargjaldi, meðan hendan veðhavaralýsing er í gildi (samb. seinastu fyrisetingina). Vil tryggingarfelagið, um eigarin ikki svarar sína gjaldingarskyldu, krevja, at tryggingargjaldið verður goldið av veðhavaranum, má hetta kravið vera gjørt skjótast gjørligt og í seinasta lagi innan 60 dagar eftir forfalsdagin. Um veðhavarin rindar tað tryggingargjald, sum hann borgar fyri, innan 48 tímar eftir tað, hann hevur fingið kravið, skulu bæði hann og eigarin fyri tað tíðarskeið, sum tryggingargjaldið er fyri, eiga rættindir, eins og hevði tryggingargjaldið verið goldið í rættari tíð.

Umframt omanfyri standandi skal veðhavarin ásanna, at tað goldna tryggingargjaldið er fyribilsgjald og stendur sum sjálvskuldábyrgdari fyri eyka tryggingargjaldi, sum verður roknað fyri eitthvørt tíðarskeið, sum veðhavarainteressa er tryggjað innan fyri frumtryggingarskjalið ella skjøl, ið verða sett í staðin ella loysa hetta av.

Henda veðhavaralýsing kann til eina og hvørja tíð verða uppsøgd av veðhavaranum við 10 daga ávaring.

Henda veðhavaralýsing er undirskrivað av veðhavaranum, tryggingartakaranum og tryggingarfelagnum og fevnir eisini um tryggingarskjøl í felagnum, ið verða sett í staðin ella loysa hetta av.

Dagfesting

Sum eigari av alibrúki

Sum veðhavarar

Sum tryggingarfelag

betri

**Betri Trygging P/F**
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
110 Tórshavn

Tel +298 348 600
betri@trygging.fo
www.betritrygging.fo